## Grønland rætt til størri kvotu

Ole Samsing, sum umboðar Danmark og harvið eisini Føroyar og Grønland í altjóða hvalaveiðinevndini IWC, sigur, at grønlendingar hava rætt til at veiða fleiri stórhvalir enn nú. Ole Samsing vísir á, í 1992 bleiv ásett, at grønlendingum tørvar 670 tons av tvøsti um árið, men av tí at fólkatalið er vaksið 10 prosent síðani, eigur Grønland at fáa størri kvotu, sigur hann. Tí vónar hann at kunna útvega Grønlandi loyvi at veiða fleiri kúlubøkur.





*Martin N. Simonsen (í hvítum) er nýggi dagligi verkætlanarleiðari á Klippfisk. Martin hevur eina cand.mag. útbúgving innan miðlavísing frá Københavns Universitet*

# Eitt nýtt filmsumhvørvi

**Klippfisk fer frá nú av at húsa eitt nýtt og øðrvísi filmsumhvørvi/virksemi. Felagið hevur skipað sær nevnd og sett ein dagligan verkætlanarleiðara, Martin N. Simonsen, ið skal samskipa stóru ætlaninar fyri filmsvirkseminum. Stórar ætlanir eru fyri framman. Millum annað verður Agurk aftur á skránni hjá Sjónvarpi Føroya í heyst, og Klippfisk skipar fyri einum filmsskúla í summar í samstarvi við »Northern Creative Youth«, ið er ein felagskapur fyri kreativum ungdómum í fleiri londum í Evropa og nú í Føroyum fyri fyrstu ferð í summar**

FILMSVERKÆTLAN

*Bjørk Krog Olsen*
*Bjork@sosialurin.fo*

Klippfisk varð stovnað fyri smáum fýra árum síðani við tí fyri eyga at skapa ein filmsverkstað fyri filmsáhugaðum. Tíverri var fíggjarligi stuðulin ikki nøktandi, og verkætlanin eydnaðist ikki nóg væl. Býráðið hevur síðan broytt hugsan um verkætlanina og givið Klippfisk fíggjarligar karmar at reka eitt dagligt virki. Felag varð síðan endurstovnað, og nevnd varð skipað á heysti í 2007 við Jákupi Veyhe á odda sum nevndarformann við Jan Jørgensen og Mikkjali Helmsdal sum nevndarlimir. Stórar ætlanir eru fyri framman hjá felagnum, og tí hevur nevndin valt at seta Martin N. Simonsen í starv sum dagligur verkætlanarleiðari hjá Klippfisk. Klippfisk fer at vera opið fyri almenninginum allar vikudagar frá klokkan eitt til fýra. Tað ber nú til hjá teimum, ið hava tørv á tí, at fáa dagliga kunning og vegleiðing um filmsvirkið. Eisini ber til hjá filmsáhugaðum at leiga tilfar hagani. Martin N. Nolsøe greiðir frá, at tey hava vælútbúgvnar og dugnaligar føroyingar innan allar filmsgreinar, og tí ræður um at samansjóða hesar førleikarnar og gagnnýta teir sum best.

### Framtíðarætlanir

Tað eru trý viðurskifti, ið verða raðfest á Klippfisk komandi tíðina: Undirvísing, skeið og framleiðsla. Ætlanin er at fyriskipa ein kvøldskúla í filmi fyri bæði royndum og óroyndum. Eisini vera skeið í filmslist, ið vera á einum støði, sum skullu virka sum endurútbúgvingarskeið fyri fólk, ið frammanundan hava útbúgving innan film, grafik, klipp og líknandi. Klippfisk vil húsa einari produktivari framleiðslu innan film og gera filmslist til eitt vinnuligt fyribrygdi.

- Síðan 90'ini hevur Ísland framleitt meir enn 6 filmar um árið í miðal, og verður hetta samanborið við støddina av Føroyum, samsvarar hetta við framleiðslu av einum filmi um árið her heima, greiðir Martin N. Simonsen frá. – Ætlanin er einaferð at gera føroyskar spælifilmar, men tað krevur, at vinnan í Føroyum sær fyrimunin at skapa film og at politiski viljin er tilstaðar. Martin sigur frá, at fólk kring heimin eru troytt av enskum og amerikonskum spælifilmum og vilja síggja eksotiskar og øðrvísi filmar. – Hetta er ein stórur fyrimunur fyri føroyskari filmsvinnu í einum altjóða høpi. Klippfisk arbeiðir við at fáa útlendskar framleiðarar til Føroyar og samstarva við teimum. – Film hevur eisini stóran týdning fyri marknaðarføringini av Føroyar, og tí átti størri dentur at verða lagdur á hetta økið, sigur Martin.

### Komandi tiltøk

Fyrsta skeiðið er eitt trýdagaskeið í síðstu vikuni í juni. Tað er ikki neyðugt at vera royndur innan film fyri luttaka. Tað er eitt skeið, har kunnað verður um tað grundleggjandi innan filmsframleiðslu. Til ber at tekna seg á Tórshavnar kvøldskúla. Summarið 2009 samstarvar Klippfisk við Samvit um ein film- og summarskúla. Tað er ein 14 dagar langur summarskúli, sum skal læra og venja fólk, ið hava evni innan filmslist. »No Cry« er ein felagsskapur, ið upprunaliga er úr Finnlandi, men er síðani komið til Svøríkis, Noregs, Finnlands, Norður-Skotlands, Norður Írlands og síðan Føroya. »No Cry«, Northern Creative Youth, er ein felagsskapur, ið arbeiðir fyri at savna kreativan ungdóm saman við tí fyri eygað at skapa kreativa vinnu. »No Cry« samstarvar millum londini ígjøgnum alnetið. Hetta er fyrstu ferð Klippfisk skipar fyri hesum tiltakinum.

### Agurk verður aftur á skránna í heyst.

Enn einaferð verður Agurk á skránni hjá Sjónvarpi Føroya. »Filmsummar« verður heitið á kappingini. Sendingar hjá Klippfisk og Agurk verða sendar í Sjónvarpi Føroya í heyst. »Filmsummar« er ein stuttfilmakapping, har evnið er føroyskt summar. Øll kunnu framleiða sín egna stuttfilm um »Summar í Føroyum«, senda hann inn til Agurk, sum letur vinnaranum ein vinning, ið hevur eitt virði á 15.000 kr. Fýra sendingar verða sýndar.